# Tor Shipping partur av heimsumfatandi kervi



*Tor Shipping fór at virka í einum kjallara við einum starvsfólki í 1990. Í dag starvast 4 fólk á skrivstovuni, sum liggur í miðýnum í Havn*

**Skipakeyparar og skipaseljarar eru í góðum hondum hjá Tor Shipping. - Vit hava gjøgnum árini mangan havt heiðurin av at verið millumlið, tá ið skip og bátar hava skift eigara, og serliga á føroyska fiskiskipamarknaðinum er Tor Shipping ein kendur meklari, sigur felagið**

INNSENT TILFAR
*Redigering: Vilmund Jacobsen*

Tor Shipping varð sett á stovn í 1990 og er einasta virkið av sínum slag í Føroyum.

- Við skipaumboðan, meklaravirksemi, chartri og skiparakstri hava vit ein breiðan skara av viðskiftafólki, bæði í Føroyum og uttanlands. Eins og aðrar vinnur flest, hava álit og dygd avgerandi týdning fyri eitt vaksandi virksemi innan skipavinnuna.

Felagið sigur, at ein liður í strembanini eftir at tryggja eina góða tænastu, er góðkenningin, ISO 9001:2000 Quality Management System Certificate, sum Tor Shipping fekk í mars í 2001. ISO prógvið fevnir um allar tær fýra nevndu tænasturnar.

- Vit eru eisini, sum einasta felag av sínum slagi í Føroyum, vorðin limur í altjóða felagsskapinum, Multiport Ship Agencies Network frá 1. januar 2002. Hetta er felagsskapur av skipaumboðum úr fleiri enn 100 londum.

Tor Shipping sigur, at í Multiport eru lyklaorðini professionalisma, reiðiligt samstarv og støðug fíggjarviðurskifti.

- Fyri at gerast limur í hesum felagsskapi skalt tú kunna vísa á eitt gott umdømi sum skipaumboð og eina góða fíggjarstøðu. Eina ferð um árið verður kannað eftir, um allir limirnir lúka hesi krøv.

## Partur av heimsumfatandi kervi

Endamálið við at vera limur í slíkum felagsskapi, sigur Tor Shipping, er at vera partur av einum heimsumfatandi kervi, har limirnir boða hvørjum øðrum frá og bjóða hvønn annan fram. Samstundis er limaskapurin ein vissa til viðskiftafólkini um, at tænastan, tú fært, er á hægsta støði.

Skipakeyparar og skipaseljarar eru í góðum hondum hjá Tor Shipping.

- Vit hava gjøgnum árini mangan havt heiðurin av at verið millumlið, tá ið skip og bátar hava skift eigara, og serliga á føroyska fiskiskipamarknaðinum er Tor Shipping ein kendur meklari.

At Tor Shipping fæst við skiparakstur, merkir, at felagið tekur sær av skipum, sum útlendskt reiðarí hava skrásett í FAS.

- Mong munnu minnast, tá ið norska tangaskipið, "Bergina", bleiv skrásett í FAS fyri einum góðum ári síðani. "Bergina", sum er sjey ferðir størri enn "Norrøna", er nógv tað størsta skipið í føroyska flotanum. Umframt norska tangaskipið, rekur Tor Shipping 11 donsk skip, sigur felagið.

# Virksemið hjá Fofish er tódnað

**Fiskasølufelagið, Fofish í Saltangará, er framvegis eitt virkið felag, men síðan byrjanina í vár, er eitt av reiðaríunum farið burturúr aftur samstarvinum**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Í fiskivinnuinnlegginum í Sosialinum í vár høvdu vit samrøðu við Ábraham Løkin, sum júst tá hevði stovnað fiskasølufelagið, Fofish í Saltangará, saman við Leif Høj, báðir við drúgvum royndum innan okkara høvuðsvinnu.

Hetta var ein av teimum góðu søgunum í blaðnum, tí her høvdu vit eitt felag, sum skuldi átaka sær at selja fiskin hjá eini 16 trolarum.

Felagið skuldi selja fiskin fyri skipini hjá Osmundi Justinussen, Olafi Olsen og Jónsveini Knudsen og annars samskifta við skipini og leggja landingarnar til rættis.



*Sp/F Fofish selir fyri provotión; tí er umráðandi fyri báðar partar, at mest møguligt fæst fyri fiskin. Polarhav og Stjørnan teljast framvegis millum skipini, sum eru við í samstarvinum millum reiðaríini og fiskasølufelagið.*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Afturfyri skuldi Fofish fáa provotión av søluni.

Avtala varð gjørd við reiðaríini um, at felagið skuldi selja fiskin hjá skipunum í fyribils tvey ár, men avtalan kundi reviderast alla tíðina.

## Tekur seg úr

Fofish er framvegis eitt virkið felag, men síðan byrjanina, er eitt av reiðaríunum farið burturúr aftur samstarvinum. Tað er felagið, Snaraløkur, hjá Jónsveini Knudsen.

- Vit eru ikki við longur, men tað eru skipini hjá Osmundi og Olafi haraftur ímóti.

Spurdur, hví Snaraløkur tók seg burtur úr samstarvinum eftir nakrar mánaðir, sigur Jónsvein, at tað dugir hann ikki so væl at seta orð á, men hetta var ikki í ósemju millum feløgini.

- Eg vil ikki siga, at Fofish ikki gjørdi eitt gott arbeiði, men tað kostar pening at lata aðrar taka sær av hesum virksemi. Sjálvur hevði eg minni at gera, sum tíðin leið og hevði tískil stundir at taka mær av hesum partinum av virkseminum. Og okkurt skalt tú jú gera, tá ið tíð leypur av, sigur Jónsvein, sum hevur fingist við skiparakstur í mong ár.

## Dugnalig fólk

Aftrat sær á Snaraløki hevur reiðarin eitt _ skrivstovufólk aðruhvørja viku, umframt ein mann, sum tekur sær av skipunum, tá ið tey eru inni.

- Skrivstovukvinnan er Anita Tausen, og maðurin er Ingi Hansen, bæði sera dugnalig, sigur Jónsvein Knudsen, reiðari.

# Skip koma og fara – og vit liggja bakk

**- Kanska var tíðarskeiðið at leggja skipini ikki tað rætta, tí fiskiskapurin hevur verið so góður hesa tíðina, meðan øll skipini hjá okkum hava ligið, sigur Jónsvein Knudsen**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*



*- Tað hevur verið ótrúliga ringt at síggja skip koma og fara, meðan vit hava ligið "bakk", sigur Jónsvein Knudsen, reiðari.*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Reiðarin, Jónsvein Knudsen, sigur, at tað hevur verið ótrúliga ringt at síggja skip fara avstað og koma aftur við nógvum fiski, meðan skipini, sum Snaraløkur eigur og umsitur, hava ligið.

Umframt Jaspis og Ametyst, sum hava ligið síðan, 11. september, hevur Smaragd, ið P/F Kúrberg eigur, eisini verið í Danmark í langa tíð.

Smaragd fór til Danmarkar um hálvan august og fór í vinnu aftur fyri stívliga 14 døgum síðan.

Reiðarin sigur, at kanska var hetta ikki rætta tíðarskeiðið at leggja skipini, tí fiskiskapurin hevur verið góður, meðan skipini hava ligið "bakk", sum hann tekur til.

- Men nú eru hesi arbeiði so gjørd, og tað er gott, leggur hann aftrat.

## Eisini sandblástur

Smaragd hevur verið í Skagen, har alt arbeiði er gjørt.

- Skipið er sandblást, bæði botnur, skrokkur og arbeiðsdekk. Motorurin er tikin í botn, og neyðkallikrøv eru uppfylgd. Allur hydraulikkur er skiftur, og skipið hevur fingið nýggjar pavnar. Trolbanarnir á dekkinum eru tvídeildir, heilt fram í gron.

Jónsvein sigur, at Smaragd partrolar saman við gamla Safir, sum í dag eitur Føstuvarði.

- Føstuvarði hevur kortini verið nokso fitt í vinnu, meðan Smaragd hevur verið í Danmark. Teir hava gjørt onkrar túrar saman við Vesturtúgvuni og saman við onkrum av skipunum hjá P/F Beta.

Snaraløkur umsitur eisini skipini hjá Bjarta Mohr, Suðurvarða, Vesturvarða og Norðbúgvan.

## Ógvuliga góð fiskiár

Jónsvein Knudsen ásannar, at seinastu árini hava verið ógvuliga góð hjá skipunum, og serliga árið í ár hevur verið gott.

- Men nú eru spádómarnir ikki so bjartir. Tó merkja vit einki til, at fiskiskapurin er vorðin slakari. Fiskifrøðingar siga frá vánaligum gróðuri, og vit eiga at lurta eftir tí, teir siga, hóast vit ikki eru samdir í øllum.

Reiðarin ásannar, at tað verður altíð upp-og niðurgongd í fiskivinnuni.

- Vit, sum hava fingist við fiskivinnu í mong ár, vita, at trøini veksa ikki inn í himmalin, sigur Jónsvein Knudsen.


